Fróðskaparsetur Føroya
University of the Faroe Islands

Føroyamálsdeildin
Department of Language and Literature

# Skeiðslýsing — Heystið 2018
## *Course description*

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Skeiðsnummar** *Course number* | 1357.18 | **ECTS** *ECTS* | 10 | **Ábyrgd** *Contact* | Bergur Rønne Moberg |

| | |
|---|---|
| **Stig** *Level* | BA |
| **Heiti** *Title* | ‘Blue North’. Ímyndir um norð í norðuratlantiskum skaldsøgum (BA) |
| **Endamál** *Aim* | At kanna Nordic Noir-dæmdar ímyndir í norðuratlantiskum skaldsøgum við støði í ’Place Studies’ og bókmentalandafrøði. Studentarnir ogna sær vitan um, hvussu landafrøðiligar ímyndir verða brúktar í skaldsøgum og í øðrum skaldskapi. Serliga verður hugt at ímyndum um norð, sum bindur nógvar landafrøðiligar lýsingar saman. Til tess at kanna dynamikkin í hesum ímyndum verða serliga (landafrøðilig) hugtøk sum ‘the blues’, ‘imagined geography’ og ‘ultraminor literature’ brúkt sum greiningaramboð. |
| **Innihald** *Content* | Greindar verða føroyskar og íslendskar skaldsøgur, men eisini aðrir skaldsligir tekstir. Greinar um miðstødd hugtøk innan Place Studies og bókmentalandafrøði verða lisnar saman við greiningum av ítøkiligum tekstum og fyribrigdum. Við hesum amboðum verða ímyndir um norðuratlantisk landsløg í skaldskapi kannað við serligum atliti at ‘scapes’ knýtt at landi og havi/vatni. Serligur dentur verður lagdur á ímyndir um norð og hvussu tær spíla seg út í skaldskapi í 20. øld, men við nógvum heilsanum aftureftir til upphavligar ímyndir um norðurheimin. Í greiningunum verður dentur lagdur á kosmopolitiska samspælið millum tað lokala, tjóðskaparliga, regionala og globala. |
| **Læru- og undirvísingarhættir** *Learning and teaching approaches* | Fyrilestrar og lærara- og studentaframløgur umframt bólkaarbeiði. |
| **Próvtøkuháttur** *Assessment method* | Bundin heimauppgáva (3 vikur) |
| **Lestrarlisti** *Literature* | Lestrarlistin er 2 vísindaverk og 4 bókmentaverk<br>Grundbók: |

| | |
|---|---|
| | *Nordic Literature. A Comparative History*. Vol. 1: Spatial nodes. Thomas A. DuBois, Dan Ringgaard, Mark B. Sandberg, and Steven P. Sondrup, Mark B. (eds.). |
| **Læruúrtøka**<br>*Learning outcomes* | Studentarnir hava við skeiðslok ognað sær førleika í:<br><br>• At miðla vitan um sambandið millum bókmentir (skaldsøguna) og landafrøði við serligum atliti at ímyndum um norð og norðuratlantisk landsløg<br><br>• At lýsa ymsar tilgongdir til hugtøk sum ‘norður’, ‘Blues’, ‘Imagined Geography’, ‘(Ultra)minor’ bókmentir<br><br>• Nýta hugtøk innan Place Studies, bókmentalandafrøði og prosafrøði<br><br>• At greina sambond millum skaldsøguna sum prosa og landafrøði<br><br>• At greina sambond millum bókmentir og landafrøði á annan bógvin og branding og mentanarferðavinnu á hin bógvin<br><br>• Seta víðkanina og sundurgreiningina av ímyndum um norð í eitt heimsbókmentaligt høpi<br><br>• At greina sambond millum bókmentir og kosmopolitismu/mentanarliga globalisering við atliti til staðbindandi ketur millum tað lokala, nationala, regionala og globala. |
| **Fortreytir**<br>*Prerequisites* | Studenturin skal hava staðið fyrra part av BA í føroyskum ella samsvarandi. Til ber eisini at taka skeiðið sum stakskeið við øðrum fortreytum (víst verður til galdandi námsskipan). |
| **Próvdøming**<br>*Examination* | Uttanhýsis |
| **Próvtalastigi**<br>*Marking scale* | Galdandi próvtalastigi |